betri pensjón

# Heilsuváttan

| Navn | | P-tal |
|---|---|---|
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |
| Teldupostur | Telefonnummar | |

*Er tørvur á fleiri upplýsingum, seta vit okkum í samband við teg umvegis teldupost. Um tørvur er á meira plássi, kanst tú nýta eitt skjal afturat. Minst til at dagfesta og undirskriva skjalið.*

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 3 árini verið í samband við, vorðin kannað/ur ella fingið viðgerð hjá lækna, serlækna, sjúkrahúsi ella øðrum viðgera? (T.d. hjá fysioterapeuti, sálarfrøðingi, rúsviðgera ella øðrum) *Her verður ikki hugsað um krím, influensa og líknandi* | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri: Orsøk? |
| | | | Nær? |
| Hevur tú ampa/fylgjur? | ☐ | ☐ | Hvørjar? |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 10 árini verið viðgjørd/ur við heilivági í einum tíðarskeiði uppá meira enn ein mánaða? *Herundir eisini pínulinnandi og sissandi heilivágur* | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri: Slag av heilivági? |
| | | | Orsøk? |
| | | | Nær? |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 10 árini verið sjúk/ur ella óarbeiðsfør/ur meira enn ein mánaða? | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri: Orsøk? |
| | | | Nær? |
| | | | Hvussu leingi? |
| Hevur tú ampa/fylgjur? | ☐ | ☐ | Hvørjar? |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Ert tú fult arbeiðsfør/ur? | ☐ | ☐ | Um nei: Hví ikki? |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 10 árini søkt um, fingið almannahjálp ella endurgjald orsakað av heilsuni? | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri:<br>Orsøk? |
| | | | Nær? |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Ert tú undir endurútbugving, hevur skift starv ella arbeiðir tú niðursetta tíð av heilsuávum? | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri:<br>Orsøk? |
| | | | Síðani nær? |

| | | |
|---|---|---|
| Hvussu høg/ur ert tú, og hvussu nógv vigar tú? | Hædd (cm) | Vekt (kg) |

| | Nei | Ja | |
|---|---|---|---|
| Roykir tú? | ☐ | ☐ | Um ja, útfyll niðanfyri:<br>Daglig nýtsla? |
| Um nei, hevur tú roykt innan fyri seinastu 2 árini? | Nei ☐ | Ja ☐ | Nær gavst tú? |

*Eg havi svarað øllum spurningum eftir bestu sannføring og havi ikki tagt við nøkrum. Eg eri klár/ur yvir, at ósannar ella vantandi upplýsingar kunnu hava við sær, at fulnaður ikki fæst frá tryggingini, um tørvur er á endurgjaldi frá Betri Pensjón.*

Dagfesting

Undirskrift

*Vinarliga minst til at undirskriva samtykkið á næstu síðu.*

betri pensjón

# Tá eg ynski at tekna eina trygging ella gera broytingar í eini trygging, eg havi frammanundan

LÍVS- OG PENSJÓNSTRYGGING

| Navn hjá tryggjaða | P-tal hjá tryggjaða |
|---|---|
| | |

Við míni undirskrift samtykki eg, at Betri Pensjón í sambandi við mína áheitan um at tekna ella broyta eina trygging, kann fáa til vega, brúka og lata víðari upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri at viðgera mína umsókn.

Betri Pensjón fær til vega upplýsingar fyri at kunna meta um – og undir hvørjum treytum – eg kann fáa eina trygging. Betri Pensjón kann í tí sambandi lata víðari upplýsingar, sum eyðmerkja meg (td mítt P-tal) og viðkomandi upplýsingar um mítt tryggingarmál og mína heilsustøðu til tey, sum felagið fær til vega upplýsingar frá. Betri Pensjón nágreinar fyri teimum, sum upplýsingarnar verða fingnir til vega frá, hvørjar upplýsingar eru viðkomandi.

## Hvørjum kunnu upplýsingarnar fáast til vega frá?

Við hesum samtykki kann Betri Pensjón, í eitt ár frá dagfestingini av míni undirskrift, fáa til vega viðkomandi upplýsingar frá fylgjandi stovnum/persónum:

- Mínum núverandi og fyrrverandi lækna
- Almennum og privatum sjúkrahúsum, læknastovum, læknamiðstøðum og kanningarstovum
- Serlæknum, fysioterapeutum, kiropraktorum og sálarfrøðingum
- Videncenter for Helbred & Forsikring (https://helbredogforsikring.dk/)

Við hesum samtykki kunnu hesir nevndu stovnar/persónar, í eitt ár frá dagfestingini av míni undirskrift, lata viðkomandi upplýsingar víðari til Betri Pensjón.

## Hvørjum kunnu viðkomandi málsupplýsingar latast víðari til?

Betri Pensjón kann, við hesum samtykki, lata viðkomandi málsupplýsingar víðari til fylgjandi stovnar/persónar í sambandi við viðgerð av míni umsókn:

- Videncenter for Helbred & Forsikring (https://helbredogforsikring.dk/)

## Hvat slag av upplýsingum kunnu fáast til vega, brúkast og latast víðari?

Samtykkið fevnir um at fáa til vega, brúka og lata upplýsingar víðari av hesum slag:

- Heilsuupplýsingar, herundir upplýsingar um sjúkur, sjúkueyðkenni og upplýsingar um sambond í heilsuverkinum

Samtykkið fevnir ikki um upplýsingar um:

- Aðrar persónar, td um núverandi ella fyrrverandi heilsustøðuna hjá skyldfólki
- Úrslit av íleguroyndum, sum eru gjørdar fyri at nágreina vandan hjá tryggingarumsøkjaranum at fáa onkrar ávísar sjúkur í framtíðini (prædiktive genetiske tests)
- Luttøku í og úrslit av fyribyrgjandi kanningum. Tó kann úrslitið av slíkum kanningum upplýsast, um hesar vísa aktuel tekin uppá sjúku, ella tær víðvíkja sjúku, sum tryggingarumsøkjarin áður hevur havt, ella sum longu hevur tikið seg upp.

## Í hvørjum tíðarskeiði kunnu upplýsingar fáast til vega?

Samtykkið fevnir um upplýsingar í eitt 10 ára tíðarskeið frammanundan degnum, eg skrivaði undir hetta samtykkið, og fram til tann dagin, tá Betri Pensjón hevur tikið støðu til mína áheitan um at tekna ella broyta eina trygging.

Um so er, at upplýsingarnar fyri hetta tíðarskeiðið geva grundarlag fyri tí, kann Betri Pensjón við eini ítøkiligari grundgeving eisini fáa til vega upplýsingar frammanundan hesum tíðarskeiði.

## Afturkallan av samtykki

Eg kann til eina og hvørja tíð afturkalla mítt samtykki við virknaði fyri framtíðina. Afturkallanin kann hava týdning fyri møguleikan hjá Betri Pensjón at viðgera mína áheitan um at tekna ella broyta eina trygging.

Dagfesting

Undirskrift hjá tryggjaða